# Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags

Skrás. nr. 3566

## Ársfrásøgn 2017

## Frumrit

Góðkend á aðalfundi tann 9/2- 2018

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit

Síða

Upplýsingar um grunnin ..... 2
Leiðslufrágreiðing ..... 3
Roknskaparátekning ..... 8
Átekning frá óheftum grannskoðara ..... 9
Nýttur roknskaparháttur ..... 12
Rakstrarroknskapur ..... 15
Fíggjarstøða ..... 16
Frágreiðing um eginogn ..... 18
Notur ..... 19

# Upplýsingar um grunnin

**Grunnurin:**

Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags
Skrásetingar nr. 3566
Stoffalág 17
100 Tórshavn
Heimstaðarkommuna: Tórshavn

**Nevnd:**

Georg F. Hansen, formaður
Páll Nielsen
Hans Jacob Joensen
Sunrid Vang
Jan Otto S. Holm

**Stjórn:**

Elin Sørensen

**Grannskoðan:**

P/F Januar
løggilt grannskoðanarvirki

# Leiðslufrágreiðing fyri 2017

## ENDAMÁL GRUNSINS

Endamál grunsins er at reka eftirlønarvirksemi. Endamálið við hesum virksemi er at veita limunum elliseftirløn, tá limirnir gevast at arbeiða vegna aldur.

## FÍGGJARLIGA GONGDIN Í 2017

Árið 2017 er 15. roknskaparárið hjá grunninum, og var gongdin sum væntað, tá ræður um tilgongd av nýggjum limum og vøkstri av eftirlønargjøldum.

### Eftirlønarvirksemi

Eftirlønargjøldini, íroknað innskot, øktust við sløkum 5% í árinum. Útgjøldini av veitingum eru 20% hægri enn árið fyri.

### Fíggjarvirksemi

Vinningurin av íløgunum eftir umsitingarkostnað var íalt 3,3% mótvegis 3,4% árið fyri. Besta íkastið til samlaða úrslitið góvu partabrøvini, meðan útlendsku lánsbrøvini og donsku lánsbrøvini góvu áleið sama vinning.

Størsta íløgan hjá Eftirløngargrunni Føroya Arbeiðarafelag er tann í donsk stats- og realkredittlánsbrøv. Hóast rentustigið á donskum lánsbrøvum sum heild hækkaði í 2017, ein støða sum vanliga førir kurstap við sær, kastaði hesin íløgubólkur nøktandi av sær.

2017 var í nógvar mátar eitt serligt ár, millum annað tí búskaparligu umstøðurnar fyri partabrævamarknaðirnar vóru rættuliga góðar:

- Búskaparvøksturin kom á hægri stig alheims, og øll OECD lond høvdu góðan búskaparvøkstur
- Inflatiónin í týðandi búskapunum var metlág
- Inntøkurnar hjá virkjum vóru góðar, og hetta sást aftur í, sum heild, góðum roknskapum
- Pengapolitikkur hjá tjóð- og miðbankum var í andglettinum

Serliga bardagin hjá tjóð- og miðbankum fyri at hækka inflatiónina úr vandalágum stigi stjól í stóran mun yvirskriftirnar. USA kom longur á leið hesum viðvíkjandi og hækkaði leiðandi rentuna tríggjar ferðir í 2017. Í Evropa er inflatiónin framhaldandi ov lág, og fyrsta rentuhækking í Evropa, síðani 2011 er helst útsett til 2019.

Eftir óvæntaða valúrslitið í USA, setti Donald Trump seg í forsetastólin við ársbyrjan 2017. Marknaðirnir tóku væl ímóti Trump, men skjótt sást, at lítið ítøkiligt kom burturúr hjá Trump. Óttast var, at handilskríggj og aðrar neiligar hendingar fóru at koma sum avleiðing av hansara leiðslustíli og hugburði, men so var ikki. Við ársenda 2017 megnaði Trump tó at fáa eina skattanýskipan framda í verki, og hetta varð stimbrandi fyri partabrøvini, ið endaðu árið á sera høgum stigi.

Donald Trump og norðurkoreanski leiðarin, Kim Jung Un, vóru eisini í mangari orðaorrustu, men fyribils er steðgur komin í, og støðan viðvíkjandi Norðurkorea, ið sigur seg hava ment kjarnorkuvápn, sær út til at verða batnað.

Samanumtikið er nevndin í Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelags nøgd við gongdina í fíggjarligu íløgunum í 2017, tí renturnar eru framvegis sera lágar, og longu við ársbyrjan lógu partabrævakursirnir á høgum stigi.

**Staðfest úrslit**

Úrslitið fyri 2017 og býtið av hesum kann útgreinast soleiðis:

| | 2017 | 2016 |
|---|---|---|
| | DKK | t.DKK |
| Fíggjaravkast | 21.511.592 | 20.859 |
| Umsiting o.a. postar | -2.642.560 | -3.084 |
| Avs. til umsiting av eftirlønum | -883.769 | -850 |
| **Úrslit áðrenn býti** | **17.985.262** | **16.925** |
| | | |
| Fíggjaravkast til limir | 20.989.279 | 20.332 |
| Umsitingargjald limir | -3.526.330 | -3.906 |
| **Tilskrivað limum í alt** | **17.462.949** | **16.426** |
| Aðrar inntøkur/útreiðslur | 0 | -28 |
| Fíggjaravlop til eginogn | 522.313 | 527 |
| **Tilskrivað eginognini í alt** | **522.313** | **499** |
| | | |
| **Býtt úrslit** | **17.985.262** | **16.925** |

Í seinastu leiðslufrágreiðing væntaði nevndin eitt avlop fyri 2017 á sama støði sum í 2016, og vísti hetta seg at halda.

**KAPITALSTYRKI**

Grunnurin er sterkur í mun til sínar tryggingarligu skyldur.

| | 31.12.2017 | 31.12.2016 |
|---|---|---|
| | DKK | t.DKK |
| Eginogn | 15.789.521 | 15.267 |
| Limakontur | 58.873.640 | 56.338 |
| **Kjarnufæfeingi** | **74.663.161** | **71.605** |
| **Grundarfæfeingi** | **74.663.161** | **71.605** |
| | | |
| Fæfeingiskrav | 26.057.150 | 26.028 |
| **Kapitalstyrki** | **48.606.011** | **45.577** |

Individuelli solvenstørvur grunsins er uppgjørdur til 15,6 mió.kr. við árslok 2017.

**STÝRING AV VÁÐA**

Nevndin ger karmar fyri stýring av váðum í grunninum, meðan dagliga leiðslan leypandi heldur eyga við, at karmarnir verða hildnir.

Grunnurin er í høvuðsheitum ávirkaður av hesum váðum:

- Fíggjarligir váðar
- Tryggingarligir váðar
- Umsitingarligir váðar

**Fíggjarligir váðar**

Fíggjarligir váðar kunnu flokkast í

- Marknaðarváða
- Gjaldførisváða
- Mótpartsváða
- Spjaðingarváða

Marknaðarváðin er váðin fyri, at dagsvirðið á aktivunum ella skyldunum hjá grunninum broytast vegna broytt marknaðarviðurskifti so sum rentu, kursir o.a.

Gjaldførisváðin er váðin fyri at staðfesta tap vegna frígeving av gjaldføri fyri at kunna rinda sínar skyldur innan ein stuttan tíðarkarm.

Mótpartsváðin er váðin fyri tapi vegna tess, at mótpartar ikki halda sínar skyldur. Vantandi spjaðing kann føra tap við sær, um íløgur í ov stóran mun eru bundnar í ávísar vinnur ella marknaðir o.s.fr.

Fyri grunnin er marknaðarváðin nógv tann størsti fíggjarligi váðin. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv saman við eini varisligari íløgustrategi fyri partabrøv. Somuleiðis eru íløgurnar í partabrøv varisligar. Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti. Hetta kann so viðføra, at avkastið í góðum árum er verri enn aðrar tíðir.

Gjaldførisváðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í likvidum, børsskrásettum virðisbrøvum. Av tí, at tað er rættiliga greitt, hvussu gjaldføristørvurin verður framyvir, verður gjaldførisváðin hjá grunninum ikki mettur at vera stórur, men nevndin hevur støðugt eftirlit við gjaldførisgongdini.

Mótpartsváðin verður avmarkaður við, at ein sera stórur partur av íløguognunum er settur í stats- og realkredittlánsbrøv við høgari rating. Spjaðingarváðin verður avmarkaður við at spjaða íløgur grunsins í ymsar vinnur og marknaðir og við at avmarka íløgur í sama útskrivara.

**Tryggingarligir váðar**

Teir tryggingarligu váðarnir kunnu flokkast í

- Livitíð
- Avlamni

Váðin í.s.v. livitíð verður avmarkaður við, at veitingar til lívrentur verða útroknaðar varisliga og samsvarandi tí grundarlagi, sum fráboðað er.

Við avlamni er váðin hjá grunninum avmarkaður til gjaldsundantøku í 12 mánaðir.

**Operationellir váðar**

Grunnurin kann koma út fyri fíggjarligum tapum vegna umsitingarligan váða, ella hesin kann skaða umdømi grunsins.

Umsitingarligir váðar umfata váða fyri tapi vegna feilir í KT-skipanum, løgfrøðiligum ósemjum, og ikki nøktandi ella skeivum mannagongdum ella sviki.

Grunnurin avmarkar umsitingarligan váða við innanhýsis mannagongdum, innaneftirliti og funktiónsskilnaði, sum javnan verða endurskoðað og dagførd.

## ETISK ATLIT

Íløguvirksemið hjá grunninum verður skipað soleiðis, at málið um hægst møguligt avkast verður rokkið, samstundis sum atlit verður tikið at, um íløgurnar eru etiskt og sosialt ráðiligar. Fíggjaríløgur grunsins verða umsitnar av íløgurøktarum uttan fyri felagið, og í avtalum við íløgurøktararnar verður ásett, at dentur áhaldandi skal leggjast á, at íløgurnar etiskt eru í lagi.

## HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK

Grunnurin hevur í eina tíð verið í samskifti við Taks um bygnaðin av grunninum í mun til eftirlønaróggavuna. Síðani roknskaparlok hevur nevndin broytt reglugerðina og hevur gjørt uppskot til broytingar í viðtøkum grunsins, sum verða lagdar fram til góðkenningar á komandi aðalfundi. Taks hevur boðað frá, at nú hesar broytingar verða framdar, hava tey ongar viðmerkingar til bygnaðin av grunninum.

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki annað hent, sum eftir leiðslunnar áskoðan hevur týðandi ávirkan á ársroknskapin.

## ÚTLIT FYRI 2018

Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags hevur seinnu árini rikið eina sokallaða balanseraða íløgu, fyri at fáa so nøktandi vinning til limirnar í grunninum sum gjørligt.

Í balanseraðu íløguni liggja tríggir høvuðsbólkar av íløgum. Hesir eru donsk lánsbrøv, sum fevna um vanlig donsk stats- og realkredit lánsbrøv, útlendsk partabrøv, ið er ein væl spjødd íløga í alheims partabrøv, ið hava staðið eina etiska gjøgnumgongd, og til seinast útlendsk lánsbrøv, ið fevna um undirbólkarnar "Investment Grade", "High Yield" og "Emerging Markets".

Orsøkin til, at leiðslan fyri grunnin valdi at gera íløgur í hesar tríggjar høvuðsbólkar, er fyri at fáa liðiligheit í samlaðu íløguna, soleiðis at hon kann standa seg undir so nógvum íløguviðurskiftum sum gjørligt.

Gongur væl búskaparliga í heiminum, kann samlaða íløgan tillagast hesa sannroynd, og tað sama kann gerast, tá tað sansar at búskaparliga og kreppur herja.

Evropiski og amerikanski búskapurin er komin væl úr lágkonjunkturinum, sum herjaði eftir fíggjarkreppuna. Vøksturin í USA kom lutfalsliga skjótt, og í USA hevur longsta tíðarskeið við búskaparligari framgongd verið síðani seinna heimsbardaga. Hampuligur vøkstur er eisini í Evropa, og hesin kom skjótari enn upprunaliga væntað.

Báðumegin Atlantshavið er framvegis lág inflatión, so júst inflatiónin verður í sjóneykuni hjá bæði amerikanska og evropiska miðbankanum. Miðbankarnir fáa sostatt aftur týðandi leiklut í 2018.

Væntað verður, at týðandi búskapirnir í heiminum framhaldandi fara at verða væl fyri í 2018, hóast tað serliga í USA verður heldur truplari at varðveita góða vøksturin, eitt nú tí at arbeiðsmegi vantar á fleiri økjum.

Útlitini fyri partabrøvunum eru framhaldandi góð, hóast minni skal til, fyri at leypa ótta á marknaðin, tá hesin hevur ligið á høgum stigi leingi.

Væntað verður ikki, at ógvisligar rentuhækkingar verða at síggja á lánsbrævamarknaðunum, so útlit eru fyri, at donsku lánsbrøvini kunnu kasta nøktandi vinning av sær, sammett við verandi rentustig.

Nevndin væntar, við hesum í huga, at fíggjarligu íløgurnar fara at geva vinning í 2018, sum væntandi verður á sama støði sum í 2017 ella eitt vet lægri.

# 5-ára yvirlit

**Høvuðstøl (t.DKK)**

| | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Eftirlønargjøld | 43.123 | 40.217 | 38.226 | 36.466 | 29.923 |
| Útgoldnar veitingar | -13.720 | -11.429 | -7.439 | -7.653 | -7.807 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 21.512 | 20.859 | 24.052 | 39.510 | 23.489 |
| Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi | -2.643 | -3.056 | -2.450 | -2.073 | -2.068 |
| Ársúrslit | 522 | 499 | 690 | 1.142 | 772 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til eftirlønarskyldur tilsamans | 608.096 | 562.882 | 519.225 | 470.695 | 410.271 |
| Limakontur tilsamans | 58.874 | 56.338 | 53.805 | 50.636 | 45.952 |
| Eginogn tilsamans | 15.790 | 15.267 | 14.768 | 14.078 | 12.936 |
| Aktiv tilsamans | 682.759 | 634.650 | 587.913 | 535.515 | 469.303 |

**Lyklatøl**

| | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lykatøl fyri fíggjarvirksemi** | | | | | |
| Avkast | 3,3% | 3,4% | 4,3% | 7,9% | 5,3% |
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váða** | | | | | |
| Kostnaðir í prosent av eftirlønargjøldum | 6,1% | 7,6% | 6,4% | 5,7% | 6,9% |
| Kostnaðir í prosent av avsetingum | 0,5% | 0,6% | 0,5% | 0,5% | 0,5% |
| Kostnaðir fyri hvønn lim | 143 kr. | 174 kr. | 143 kr. | 124 kr. | 129 kr. |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | | | | |
| Eigarakapitalstig | 12,3% | 12,7% | 13,2% | 13,7% | 14,4% |
| Limakapitalstig | 9,7% | 10,0% | 10,4% | 10,8% | 11,2% |
| Yvirdekningsstig | 8,0% | 8,1% | 8,2% | 8,2% | 8,0% |
| Solvensdekningur | 286,5% | 275,1% | 262,5% | 246,5% | 224,3% |
| **Lyklatøl fyri renting** | | | | | |
| Renting av eginogn | 3,4% | 3,3% | 4,8% | 8,5% | 6,2% |
| Renting av kundamiðlum eftir kostnaðir | 2,9% | 2,9% | 3,8% | 7,4% | 4,8% |

# Roknskaparátekning

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn fyri grunnin fyri 2017. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í tryggingarlógini.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi og tryggjar, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og av úrslitinum av virkseminum hjá grunninum.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin, og mælt verður til at góðkenna hana.

Tórshavn, tann 5. februar 2018

**Stjórn**

Elin Sørensen, stjóri

**Nevnd**

Georg F. Hansen, form.

Hans Jacob Joensen

Páll Nielsen

Sunrid Vang

Jan Otto S. Holm

# Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til eigararnar í Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelags**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelags fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2017 við leiðsluátekning, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum fyri grunnin. Ársroknskapurin eru gjørdir eftir løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2017 og av úrslitinum av virksemi grunsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2017 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, eisini hava vit hildið hinar etisku skyldurnar hjá okkum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Áherðsla á viðurskifti í roknskapinum**

Uttan at tað ávirkar okkara niðurstøðu skulu vit vísa til umrøðu av viðtøkubroytingum í leiðslufrágreiðingini undir "Hendingar eftir roknskaparlok" á síðu 5.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við føroysku tryggingarlóggávuna. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til fyri, at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað

**Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissu er vissa við høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í roknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum er galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini, har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðar fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøð-unum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um ta samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í roknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskiftir og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær grannskoðað verður og eisini um týðandi avdúkingar, herundir um týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga niðurstøðu við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum, er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina, og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa, um kravdu upplýsingarnar eftir føroysku tryggingarlóggávuni eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd eftir ásetingunum í føroysku tryggingarlóggávuni. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivar upplýsingar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 5. februar 2018

**P/F JANUAR**
løggilt grannskoðanarvirki

Heini Thomsen
statsaut. revisor

# Nýttur roknskaparháttur

**ALMENT**

Ársroknskapurin er gjørd sambært viðtøkunum og í samsvari við ásetingarnar í tryggingarlógini og í kunngerð nr. 2 frá 30.12.2009 um ársfrásagnir.

**Alment um innrokning og máting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar so hvørt, sum tær verða forvunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – harundir eftirlønarveitingar og broytingar í avsetingum, so hvørt hesar verða staðfestar.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma grunninum til góðar, og virðið á ognini verður mett álítandi. Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá hesar eru sannlíkar og kunnu mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað til kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri.

Við innrokning og máting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váðum, ið vísa seg, áðrenn ársroknskapurin er liðugur, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

**Avrunding av upphæddum**

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Umrokning av útlendskum gjaldoyra**

Ársroknskapurin er í donskum krónum. Transaktiónir í útlendskum gjaldoyra verða støðugt umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á transaktiónsdegnum.

Áogn, skuld og aðrir moneterir postar í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðir til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

**Nærstandandi partar**

Handil og tænastur við nærstandandi partar verða avgreiddar til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

**RAKSTRARÚRSLIT FYRI 2017**

**Býti av úrsliti**

Grunninum er álagt at býta rakstrarúrslitið eftir hini sonevndu kontributiónsmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í tí.

Eginognin hevur fingið sín lutfalsliga part av fíggjaravkastinum í roknskapartíðarskeiðnum. Harumframt hevur eginognin fingið tilskrivað inntøkuførdar avsetingar í sambandi við, at limir eru deyðir og hevur fingið skuldskrivað útreiðslur, sum mett er ikki, at limirnir skulu bera.

**RAKSTRARROKNSKAPUR**

**Eftirlønargjøld**

Upphæddin umfatar goldin eftirlønargjøld í roknskapartíðarskeiðnum.

**Úrslit av íløguvirksemi**

Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. fevna um rentuinntøkur av innlánum og virðisbrøvum umframt vinningsbýti av kapitalpørtum í roknskapartíðarskeiðnum. Í uppgerðini av rentum eru afturatkomnar ikki falnar rentur við ársbyrjan drignar frá og afturatkomnar ikki falnar rentur við roknskaparlok lagdar afturat.

Virðisjavningar fevna um virðisjavningar av virðisbrøvum í roknskapartíðarskeiðnum. Tann partur av fyrisitingarkostnaði grunsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemið, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

**Útgoldin eftirløn**

Innroknað sum eftirlønarveitingar eru veitingar, sum hoyra til roknskapartíðarskeiðið.

**Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi**

Grunnurin hevur felags fyrisiting við Føroya Arbeiðarafelag, og fyrisitingarkostnaðir verða partvís býttir sambært skrivligari avtalu. Hesir kostnaðir fevna um kostnaðir í sambandi við fyrisiting av grunninum og eftirlønarmongdini.

**Flutt úrslit av íløguvirksemi**

Tann partur av úrsliti av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini, verður innroknaður í henda postin.

**FÍGGJARSTØÐA**

**Íløguognir**

Fíggjaramboð verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning mátað til dagsvirði. Handlað fíggjaramboð verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum.

Fíggjaramboð verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning mátað til dagsvirði. Handlað fíggjaramboð verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum. Sáttmála-virðið á handlaðum, men enn ikki avroknaðum fíggjaramboðum, verður tikið við sum eitt ískoyti ella ein frádráttur til tey tilsvarandi fíggjaramboðini.

Dagsvirðið á børsskrásettum fíggjaramboðum verður ásett samsvarandi endakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni.

**Áogn**

Dagsvirðið á áogn verður ásett við atliti at væntaðum tapi.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru upptiknar undir ogn, fevna um tíðaravmarkaðar rentur av fíggjaramboðum.

**Ábyrgdarlán**

Av inngjøldunum í grunnin verða 95% avsett til eftirlønarskyldur og 5% fara til innskot frá limum, sonevndar limakontur.

Tá tryggingar verða útgoldnar, verður eisini goldið út av limakontum.

Limakonturnar fáa tað avkast, sum tær undirliggjandi íløguognirnar hava kastað av sær, eins og tær rinda sín lutfalsliga part av umsitingarkostnaði grunsins.

Limakontur eru ein partur av grundarfæ-feinginum á jøvnum føti við eginognina.

**Eftirlønaravsetingar**

Sum nevnt frammanfyri verða 95% av inngjøld-unum í grunnin avsett til eftirlønarskyldur og 5% fara til innskot frá limum, sonevndar limakontur. Harumframt verða 2% av samlaðu avsetingunum avsett til umsiting av eftirlønum.

Eftirlønarútgjaldið úr grunninum til einstøku limirnar verður roknað út frá samlaða inngjaldinum hjá liminum til eftirlønarskyldur og innskot. Allar íløgur verða gjørdar eftir Unit link háttinum, har kundarnir bera íløguváðan teimum ognum, sum dekka teirra uppsparingar, og grunnurin ber váðan av teimum ognum, sum dekka eginognina.

Eftirlønaravsetingar fáa tað avkast, sum tær undirliggjandi íløguognirnar hava kastað av sær, eins og tær rinda sín lutfalsliga part av umsitingarkostnaði grunsins.

**Skuld**

Øll skuld er tikin upp til restvirði á degnum fyri fíggjarstøðuni.

# Rakstrarroknskapur

| Nota | | 2017<br>DKK | 2016<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Eftirlønargjøld** | **43.123.110** | **40.217** |
| 2 | Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 14.181.997 | 14.506 |
| 3 | Virðisjavningar | 7.858.961 | 6.634 |
| | Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi | -529.366 | -280 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi tilsamans** | **21.511.592** | **20.859** |
| 4 | **Útgoldin eftirløn** | **-13.719.870** | **-11.429** |
| 5 | Broyting í limakontum | -2.536.047 | -2.532 |
| 5 | Broyting í eftirlønaravsetingum | -45.213.911 | -43.532 |
| | **Broyting í eftirlønaravsetingum netto** | **-47.749.958** | **-46.064** |
| 6 | Fyrisitingarkostnaðir | -1.203.462 | -1.721 |
| 7 | Starvsfólkakostnaðir | -1.439.098 | -1.335 |
| | **Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi tilsamans** | **-2.642.560** | **-3.056** |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | -522.313 | -527 |
| | **EFTIRLØNARTEKNISKT ÚRSLIT** | **0** | **0** |
| | Aðrar inntøkur | 0 | 89 |
| | Aðrar útreiðslur | 0 | -117 |
| | Íløguúrslit av eginognini | 522.313 | 527 |
| | **ÁRSÚRSLIT** | **522.313** | **499** |

# Fíggjarstøða

| Nota | | 31.12.2017<br>DKK | 31.12.2016<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| | Kapitalpartar | 12.640.531 | 14.607 |
| | Íløguprógv | 266.505.738 | 264.803 |
| | Lánsbrøv | 388.655.653 | 338.585 |
| | Innlán | 12.756.633 | 14.661 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir tilsamans** | **680.558.555** | **632.656** |
| | **ÍLØGUOGN TILSAMANS** | **680.558.555** | **632.656** |
| | Onnur áogn | 117.454 | 0 |
| | **ÁOGN TILSAMANS** | **117.454** | **0** |
| | Rentur til góðar | 2.082.724 | 1.994 |
| | **TÍÐARAVMARKINGAR TILSAMANS** | **2.082.724** | **1.994** |
| | **OGN TILSAMANS** | **682.758.732** | **634.650** |

| Nota | | 31.12.2017 DKK | 31.12.2016 t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **SKYLDUR** | | |
| | Innskot | 8.420.769 | 8.421 |
| | Framflutt úrslit | 7.368.752 | 6.846 |
| | **EGINOGN** | **15.789.521** | **15.267** |
| | Innskot frá limunum (limakontur) | 58.873.640 | 56.338 |
| 5 | **ÁBYRGDARLÁN TILSAMANS** | **58.873.640** | **56.338** |
| | Eftirlønarskyldur | 608.095.571 | 562.882 |
| 5 | **EFTIRLØNARAVSETINGAR TILSAMANS** | **608.095.571** | **562.882** |
| | Onnur skuld (stuttfreistað) | 0 | 164 |
| | **SKULD TILSAMANS** | **0** | **164** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **682.758.732** | **634.650** |

8 Eventualskyldur
9 Úrslit av fíggjarognum
10 Býti av partabrøvum á vinnugreinar og økir
11 Váðalýsing
12 Nærstandandi partar

# Frágreiðing um eginogn

| | 31.12.2017 | 31.12.2016 |
|---|---|---|
| | DKK | t.DKK |
| **Eginogn** | | |
| Innskot við ársbyrjan | 8.420.769 | 8.421 |
| **Innskot við ársenda** | **8.420.769** | **8.421** |
| | | |
| Flutt úrslit við ársbyrjan | 6.846.439 | 6.347 |
| Flutt frá rakstri | 522.313 | 499 |
| **Flutt úrslit við ársenda** | **7.368.752** | **6.846** |
| | | |
| **Eginogn við ársenda** | **15.789.521** | **15.267** |
| | | |
| **Grundarfæfeingi og fæfeingiskrav** | | |
| Eginogn | 15.789.521 | 15.267 |
| Limakontur | 58.873.640 | 56.338 |
| **Kjarnufæfeingi** | **74.663.162** | **71.605** |
| | | |
| Grundarfæfeingi | 74.663.162 | 71.605 |
| Fæfeingiskrav | 26.057.150 | 26.028 |
| **Grundarfæfeingi til avlops** | **48.606.012** | **45.577** |